HEILSUMÁLARÁÐIÐ

# Vegleiðing um kærumøguleikar hjá sjúklingum og eftirsitandi hjá sjúklingum í føroyska heilsuverkinum

Í hesi vegleiðing veður greitt frá, hvørjar møguleikar tú hevur fyri at kæra um viðgerð, tú hevur fingið í føroyska heilsuverkinum.

Vegleiðingin lýsir hvat tú kanst kæra um, hvussu tú ber teg at við at kæra, hvørjar møguleikar tú hevur fyri at lata teg umboða, hvørjar kærufreistir eru galdandi o.s.fr.

***Gev gætur, at nevndu kærumyndugleikar einki hava at gera við endurgjald fyri skaðar elvdir av sjúkuviðgerð.***

*Um tú vilt hava endurgjald fyri ein skaða, tú hevur fingið í sambandi við kanning ella viðgerð í heilsuverkinum ella, sum tú hevur fingið av læknafyriskrivaðum heilivági, skalt tú fráboða skaðan til* ***Patienterstatningen.***

Tú kanst lesa meira um tínar møguleikar fyri at fáa endurgjald á heimasíðuni hjá Heilsumálaráðnum og á heimasíðuni hjá Patienterstatningen.

## Kærur um heilsufakligt virksemi

Tú kanst kæra um heilsufakligt virksemi, um tú heldur, at viðgerðin hevur verið **ónøktandi**. Heilsufakligt virksemi fevnir m.a. um:

- Kanning
- Staðfesting av, hvat tær bagir (sjúkugreining)
- Viðgerð
- Endurvenjing
- Røkt
- Kunning um og samtykki til viðgerð
- Tagnarskyldu hjá heilsustarvsfólki

Tá tú kærir, tekur ein óheftur myndugleiki støðu til, um grundarlag er fyri at finnast at viðgerðini, sum tú hevur fingið. Metingin verður gjørd við støði í tí, sum verður roknað fyri vanliga viðurkendur fakligur standardur. Støða verður ikki tikin til, um tú hevur fingið best hugsandi viðgerðina. Støða verður heldur ikki tikin til, hvørja viðgerð tú møguliga eigur at fáa í framtíðini.

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

## Hvør kann kæra?
Tú kanst kæra um viðgerð, sum tú sjálv/sjálvur hevur fingið. Tú kanst eisini við fulltrú lata ein annan persón, t.d. ein avvarðandi, ein advokat ella ein felagsskap kæra tína vegna. Á sama hátt kanst tú kæra vegna eitt annað fólk, um tú fært fulltrú frá viðkomandi.

Hevur tú foreldramyndugleika, kanst tú kæra um viðgerð, sum barn títt hevur fingið. Børn, sum hava fylt 15 ár, kunnu tó vanliga kæra sjálvi.

Um tú ert næsti avvarðandi hjá einum sjúklingi, sum er deyður, kanst tú vanliga kæra um viðgerð, sum persónurin fekk, áðrenn viðkomandi doyði.

## Hvagar skal eg kæra og hvørjar freistir galda?
Kærur um heilsufakligt virksemi skulu sendast til Styrelsen for Patientklager, sum leggur tær fyri Sundhedsvæsenets Disciplinærnævn til støðutakan. Serligt oyðublað til kærur fæst her.
Oyðublað fæst eisini við at venda sær til Heilsumálaráðið umvegis teldupost hmr@hmr.fo ella á tlf. 304050.

Kæran skal verða send áðrenn 2 ár eru gingin, eftir at tú fyrstu ferð fekk illgruna um, ella átti at havt fingið illgruna um, at viðgerðin var ónøktandi. Kæran skal tó í seinasta lagi verða send áðrenn 5 ár eru liðin síðani viðgerðin fór fram. ***Víkjast kann ikki frá freistunum!***

*Fært tú viðhald í kæru um ónøktandi viðgerð, hevur hetta við sær, at eitt ella fleiri ávís heilsustarvsfólk fáa átalu fyri ónøktandi heilsufakliga virki sítt.*

Gev gætur, at tínir møguleikar at kæra um privatstarvandi tannlæknar eru teir somu, sum fyri heilsufakligt virksemi hjá øðrum heilsustarvsfólki.

## Kærur um fyrisitingarligt virksemi
Tú kanst kæra um allar fyrisitingarligar avgerðir, sum heilsuverkið hevur tikið.

## Kærur um avgerðir viðvíkjandi viðgerð, flutningi og ferðaendurgjaldi
Tú kanst kæra um avgerðir hjá sjúkrahúsverkinum, sum ikki viðvíkja heilsufakligum virksemi. Avgerðir um virksemi, sum ikki er heilsufakligt, fevnir m.a. um:

- Rætt til viðgerð
- Rætt til flutning
- Ferðaendurgjald innanoyggja
- Ferðaútreiðslur
- Uppihald hjá sjúklingum, sum verða ávístir til sjúkraviðgerð uttanlands
- Gjald fyri ferðing og uppihald hjá fylgjarum

Kærur um avgerðir hjá sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi, skulu sendast til Føroya Kærustovn til støðutakan.

Kærur skulu vera Føroya Kærustovni í hendi í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin varð tikin.

## Kærur um innlit í sjúklingajournalir

Tú hevur sambært lógini rætt til innlit í tær upplýsingar um teg og heilsustøðu tína, sum heilsuverkið hevur skrásett. Umbøn um innlit skal svarast skjótast gjørligt. Kann umbønin ikki avgreiðast innan 10 dagar skal sjúklingurin hava at vita, hví málsviðgerðin tekur longri tíð, og nær avgerð væntandi verður tikin.
Avgerðir um at sýta fyri innliti ella um at avmarka innlit umframt brot á 10 daga freistina kunnu kærast til Styrelsen for Patientklager. Serligt oyðublað til kærur fæst her. Oyðublað fæst eisini við at venda sær til Heilsumálaráðið umvegis teldupost hmr@hmr.fo ella á tlf. 304050.

Kærur skulu vera Styrelsen for Patientklager í hendi innan 2 ár og í seinasta lagi 5 ár eftir, at avgerðin um at sýta innlit varð tikin. ***Víkjast kann ikki frá freistunum!***

*Fært tú viðhald í kæru um innlit, kann Styrelsen for Patientsikkerhed áleggja viðkomandi heilsumyndugleika, –starvsfólki ella –stovni at viðgera innlitsumbønina av nýggjum ella at útflýggja umbiðnu upplýsingarnar.*

## Kærur um tvingsil í sambandi við psykiatriska viðgerð

Tvingsil eru inntriv í sjálvræðisrætt sjúklingsins, sum sjúklingurin ikki hevur givið samtykki til. Kærur um tvingsil í sambandi við innlegging á psykiatriska deild skulu sendast til Føroya Kærustovn til støðutakan.
Sjúklingarráðgevin, sum tú hevur fingið tillutaðan í sambandi við tvingsilsinntrivið, kann vegleiða teg um, hvat tú kanst kæra um og kann hjálpa tær við at kæra.

Kærast kann um:

- Tvingsilsinnlegging
- Tvingsilsafturhald
- Afturflytan til psykiatriska deild
- Tvingsilsviðgerð (eisini nevnt tvingsilsmedisinering)
- Tvungin uppfylging aftaná útskriving
- Legufesting við tvingsli
- Valdsnýtslu í sambandi við inngávu av stillandi heilivági
- Verndarfesting
- Nýtsla av persónligum ávaringar- ella peiliskipanum og serligum hurðalásum
- Persónlig skerming, sum samanhangandi varir meira enn 24 tímar
- Læsan av hurðum á deildini
- Uppigangandi tvingsilsfesting

Kærur skulu vera Kærustovninum í hendi í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðurskiftini, ið kært verður um, funnu stað.

Um tú ert ósamd/-ur við avgerðina hjá Føroya Kærustovni, kanst tú kæra avgerðina til Det Psykiatriske Ankenævn. Kæran skal sendast til Føroya Kærustovn, sum sendir hana víðari til Det Psykiatriske Ankenævn.

HEILSUMÁLARÁÐIÐ

## Kærur um tænastustøðið

Kærur um vanliga tænastustøðið í heilsuverkinum, so sum starvsfólkaatburð, hølisumstøður, mat og reingerð skulu sendast til viðkomandi sjúkrahús ella viðgerðar-/kanningarstovn. Kærur um vanliga tænastustøðið í heilsuverkinum kunnu eisini sendast beinleiðis til Heilmálaráðið.

## Barna- og ungdómstannrøkt

Um foreldur ella verji at børnum í kommunalu tannrøktini eru ónøgd við avgerð, sum kommunustýrini taka sambært galdandi løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt, kunnu tey kæra avgerðina til Føroya Kærustovn.
Kærur skulu vera Kærustovninum í hendi í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðurskiftini, ið kært verður um, funnu stað.

## Meiri kunning, ráð og vegleiðing

Tørvar tær meira vegleiðing um tínar kærumøguleikar ella hjálp til at skriva eina kæru, kanst tú venda tær til Heilsumálaráðið umvegis teldupost hmr@hmr.fo ella á tlf. 304050.

Heilsumálaráðið, 3. november 2023